Fíggjarmálaráðið

Lønardeildin

# Semja

## millum

## Fíggjarmálaráðið

## og

## Akademikarafelagið

## Sáttmálaskeið

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2022 til 30. september í 2025.

## Lønarhækkanir

Tann 1. oktober í 2022 hækka allar mánaðarlønir 3,80 %
Tann 1. oktober í 2023 hækka allar mánaðarlønir 4,15 %
Tann 1. oktober 2024 hækka allar mánaðarlønir 4,75 %

## Sáttmálaøkið § 1

Sálarfrøðingar verður lagt afturat útbúgvingarnar, ið eru fevndir av sáttmálanum.

Deildarstjórar verða somuleiðis lagdir afturat § 1 og lagt verður afturat tekstinum:

*Deildarstjórar, ið hava útbúgving, sum hoyrir undir sáttmálaøkið hjá AKF, eru fevndir av sáttmálanum. Hetta tó undantikið §§ 4 og 14 – 28.*

## Tímalønir

Tímalønirnar verða upplýstar í lønartalvuni.

## Professaraviðbót

Frá 1. oktober 2023 hækkar professaraviðbótin kr. 1.000.

## Ásetingar um barnsferð í § 7

**Stk. 1 verður tillagað til:**

Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinna fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir

føðing fær starvskvinna farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis verða bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.

**stk. 3 verður tillagað:**

Teksturin: *"Samlaða barsilsfarloyvi við løn er framvegis 28 vikur"* verður strikað.

**Stk. 5 verður tillagað til:**
Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Frá 1. oktober 2024 kunnu hesar 10 vikurnar við løn liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið eftir viku 14.

**Onnur tillaging í § 7**
Síðsti setningur verður strikaður í § 7 verður strikaður.

## Uppsøgn § 10

Verður broytt til:

Verður starvsfólk sagt úr starvi, galda ásetingarnar um uppsøgn í løgtingslóg um starvsmenn, og uppsagnartilgongdin verður handfarin sambært galdandi fyrisitingarligum reglum.

Sama dag, sum hoyringarskriv verður handað starvsfólki, skal arbeiðsgevarin senda AKF fráboðan um, at hoyringarskriv er handað.

## Autorisatiónsviðbót

§ 21 stk. 5 verður broytt til:

Góðkendir sálarfrøðingar fáa autorisatiónsviðbót, tá ið starvið inniber útgreining og interventión sambært reglugerð um autorisatión hjá Dansk Psykolognævn.

## Serfrøðingaviðbót § 22

Stk. 1 verður broytt til:

Ein arbeiðsgevari kann, tá ið umstøðurnar tala fyri tí, tilnevna eitt starvsfólk sum serfrøðing.

Mannagongdin er, at arbeiðsgevarin vendir sær til sítt aðalráð, sum síðan tekur avgerð um góðkenning av tilnevningini. Verður tað góðkent, kann arbeiðsgevarin fyri eitt ávíst tíðarskeið ikki longri enn 3 ár í senn, tilnevna starvsfólkið sum serfrøðing, og veita eina serfrøðingaviðbót upp til markið sambært lønartalvuni um mánaðin. Verður umbønin ikki góðkend, grundgevur aðalráðið fyri tí.

Starvsfólkið skal hava minst 5 ára royndir frá viðkomandi starvi, ella samsvarandi eftirútbúgving/eykaútbúgving, og hava servitan á høgum fakligum stigi. Eisini er partur av metingini, um starvsfólkið antin hevur ávísan serligan førleika, sum starvið krevur, um starvið ber í sær ábyrgd út yvir tað vanliga, um starvsfólk í slíkum starvi er undir trýsti út yvir tað vanliga, ella um onnur serlig viðurskifti gera seg galdandi. Í tilnevningini skal verða útgreinað, hvat tað er, sum

ger, at hetta starvsfólkið verður tilnevnt serfrøðingur. Serfrøðingar eru ikki fevndir av § 25 um yvirtíð.

Upphæddirnar í stk. 1 verða settar inn í lønartalvuna og dagførdar við lønarhækkingunum.
Dømi:
Serfrøðingaviðbót: Sum er, ásetur sáttmálin *"upp í 4.000 kr. um mánaðin"*. Frá 1. okt. 2022 verður hendan upphæddin kr. 4.152 frá 1. okt. 2023 kr. 4.323,89 og frá 1. oktober 2024 kr. 4.529,28.

## Starvsaldur § 26

**Stk. 5 og 6 verður broytt til nýtt stk. 5**
**Starvsaldur**
Nemur starvsfólk sær hægri útbúgving, ið gevur rætt til umflokking, verður tað í nýggja lønarflokkinum sett á tað lønarstigið, sum í krónum liggur nærmast oman fyri verandi løn.

Verða starvsfólk úr øðrum sáttmálaøki flokkað í hesum sáttmálanum í sambandi við, at tey hava nomið sær akademiska útbúgving, verða tey somuleiðis innplaserað í viðkomandi lønarflokk á tað lønarstigið, sum í krónum liggur nærmast oman fyri verandi lønarstig. Í hesum sambandi telur ein leiðaraflokking í øðrum sáttmálaøkið ikki við, tá starvsfólk verður innplaserað í einum vanligum starvi.

Lønaraldur verður annars soleiðis, at starvsfólk, sum við fyrru innplaseringina hevði komið á eitt lønarstig, sum er javnt við ella hægri enn tað, tað kemur á í nýggju innplaseringini, fær frá hesum mundi nýggja aldursviðbót.

## Dagføringar í avtaluni um løntar Ph.d. lesandi

**Barnferð § 4**

Ásetingarnar í § 7 um barnferð í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og AKF eru galdandi.

**Eftirsitiløn § 11**

Ásetingarnar í § 9 um eftirsitiløn í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og AKF eru galdandi.

## Fylgiskjal til sáttmálan

Partarnir eru samdir um at fylgja hesi vegleiðing í sambandi við flokking av deildarleiðarastørvum v.m.

Sí serkildan tekst.

## Avtala um arbeiði umborð á rannsóknarskipinum, Jákup Sverri

Sí serskilda avtalu.

## Serlig avtala um ólagaligar arbeiðstíðir á Veðurstovuni

Sí serskilda avtalu.

Fíggjarmálaráðið
Lønardeildin

# Protokollat

### Álitisfólkaskipan

Í sáttmálaskeiðinum verður farið undir at gera eina felags álitisfólkaskipan við onnur fakfeløg. Avtala um samstarvsnevnd verður partur av arbeiðinum.

### Phd-viðurskifti

Avtalað verður at partarnir í sáttmálaskeiðinum kunna seg um arbeiðsviðurskiftini hjá phd-lesandi, og somuleiðis gera eina eftirmeting av avtaluni um løntar Phd.-lesandi.

### Setanarviðurskifti hjá granskarum

Partarnir eru samdir um at arbeiða víðari við endurskoðanini av setanarviðurskiftunum í sambandi við vísindalig/granskingar verkætlanarstørv.

Tinganes 24. november 2023

Ruth Vang, Landsstýriskvinna í Fíggjarmálum

Páll Nolsøe, formaður í AKF

Jan Mortensen, Lønarstjóri